Langur leygardagur er í Havn í dag!
-Jólatræið verður tendrað kl. 16.00 á Vaglinum!
Opið til kl. 17.00
Kunningarstovan N. Finsens gøta 13 Tlf. 15788

*Form. í havnanevndini í Vági ávarar:*

# Tvøramenn fóru eisini við oljuni

*– Tá ið Páll Vang fer at gremja seg um flakavirkið í Vági er grund til at vera á varðhaldi. Hvør skal siga: Lat bara vágbingar hava flakavirki, so fáa tvøramenn oljuna*

ÁKI BERTHOLDSEN

– Tað býráðsformaðurin á Tvøroyri førir Drelnes fram sum eina frálíka vetrarhavn, má eg tala at.

– Tí vit vita øll, at tað passar ikki.

Eyðfinn Mørk, býráðslimur, og formaður í havnanevndini í Vágs býráð, sigur, at hann er ógvuliga vonbrotin av, at býráðsformaðurin á Tvøroyri beinleiðis førir seg fram við ósannindum í royndunum at fáa oljuhavnina til Tvøroyrar.

Hósdagin bar Sosialurin tey tíðindi, at ætlanin var at stovna eitt føroyskt danskt felag, sum skuldi byggja oljuhavn á Drelnesi.



*Táið sjálvur býráðsformaðurin á Tvøroyri førir seg fram við beinleiðis ósannindum fyri at fáa fatur á oljuhavnini, má eg tala at. Veruleikin er, at Drelnes óbrúkilig vetrarhalvárið, sigur Eyðfinn Mørk, formaður í havnanevndini í Vágs Býráð*

Í tí sambandi førdi býráðsformaðurin á Tvøroyri, Páll Vang, fram, hvussu góð vetrarhavn, Trongisvágsfjørður var.

– Eg má viðganga, at tað pínur meg eitt sindur, at hann førir seg fram við beinleiðis ósannindum, sigur Eyðfinn Mørk, formaður í havnanevndini í Vágs Býráð.

Hann sigur, at øll, sum eru kunnug við havnina á Drelnesi, vita, at hon er óbrúkilig um veturin.

– Smyril skal eitast at sigla til og av havnini á Drelnesi. Men vit vita øll, hvussu ofta, hann ikki sleppur at á Drelnesi, tí at tað er so nógvir súður í sjónum. Vit vita eisini, hvussu ofttani, hann hevur slitið endarnar, við stórum vanda bæði fyri manning og ferðafólk. Og vit vita, hvussu ofta, hann hevur verið noyddur at rýma av Drelnesi.

Eyðfinn Mørk sigur, at øll, sum eru von at sigla við Smyrli, vita, hvussu stórur hurlivasin mangan er, tá Smyril ikki sleppur at á Drelnesi - og fiskivinnuhavnin er full av skipum, sum so mugu loysa og flyta, fyri at Smyril kann sleppa at.

Øll, sum eru von at sigla við Smyrli vita hurlivasan, sum stendst av, at Smyril fer av Drelnesi um morgunin, men noyðist at leggja at hinumegin, tá hann kemur aftur um kvøldið. Tey, sum so hava sett sær bilin á Drelnesi, mugu so finna sær fart yvirum fjørðin eftir bilinum.

– Veruleikin er, at havnin á Drelnesi er so vánalig, at vetrarhálvárið veitst tú ongantíð, nær Smyril fær lagt at har, ella nær hann noyðist yvirum, undir flakavirkið at liggja.

Eyðfinn Mørk heldur, at hann noyðist at gera vart við tað, tá beinleiðis villleiðingar verða førdar fram til frama fyri Trongisvágsfjørði.

– Vit minnast øll Cockrow og Scottish Princess, sum bæði eru farin á land á Trongisvágsfjørði.

**So er grund til at vera á varðhaldi**

Formaðurin í havnanevndini í Vági sigur, at tað er øll grund til at verða á varðhaldi, tá Páll Vang fer at gremja seg um flakavirkið í Vági.

Tað gjørdi hann í samrøðu við Sosialin hósdagin um syndarligu støðuna hjá útjaðaranum í Føroyum støðuna. Tá nevndi hann Fiskavirking til at halda uppat við niðsvningini og láta virkið í Vági upp ístaðin fyri tað í havn.

– Tað er spildur nýtt.

– Hann hevur ikki tikið flakavirkið í Vági – eitt tað besta í Evropa – upp á tunguna fyri. So hetta má verða eitt ella annað agn, hann ætlar at fáa vágbingar at bíta á.

– Hvør skal siga: Lat bara vágingar fáa flakavirkið, so fáa vit oljuna. Tað má vera okkurt tílíkt, sum býr undir, heldur býráðslimurin í Vági. Hann heldur, at strategiskt liggur Vágsfjørður væl betri fyri til oljuhavn, enn Trongisvágsfjørður ger.

– Vit eru nærmasti fjørður við boriplássini. Vit hava ógiliga stórt lendi framvið havnini. Vit hava góða smiðju og skipasmiðju. Og á Vágsfjørði er dýrdarlogn á øllum ættum.

*Nú eru flest øll samd um, at tað verður kanska bara tann eina útgerðarhavnin í Føroyum. Er tað so ikki at fegnast um, at hon verður í Suðuroynni?*

– Jú, tað er tað. Men eg skilji ikki, hví syðra helvt í Suðuroynni skal avtoftast, og hví alt skal leggjast á Tvøroyri.

– Sýslumaðurin og løgreglan er flutt úr Vági, til Tvøroyrar. Toll & skattstovan er flutt og gjaldsstovan er á Tvøroyri. Skipafelagið er flutt. Strandferslan, sjúkrahúsið, ellisheimið og apotekið er á Tvøroyri. Almannastovan er á Tvøroyri. Og kunningarstovan er á Tvøroyri.

– Alt virksemið er lagt á Tvøroyri. Og nú tykist sum um oljan eisini skal verða á Tvøroyri.

– Í Vági er onki eftir, og tað er nokk so trupult hjá sunnanfólki at góðtaka gongdina, heldur Eyðfinn Mørk.

Vágbingar hava eisini arbeitt við oljuvinnuni. Teir eru uppií Suður-vestur samtakinum og nú bíðar Eyðfinn Mørk spentur eftir úrslitinum av tí samstarvinum, sigur hann.

– Tað er onki at gera uttan at hava góðar vónir.



# Fá tak yvir høvdið

**-húsini eru klár at innrætta!**

Sparikassin bjóðar tær nú at fáa títt egna hús inni á Gøtu innilokað fyri ein sera rímiligan pening. Vit hava 5 hús at bjóða tær. Og tú fært møguleika til sjálvur at ávirka, hvussu hetta verður gjørt.

Tá tú fært húsini, eru tey innilokað, stykkið planerað, fjarhiti innlagdur, vatn, kloak og streymur lagt inn í húsini. Men tú gert sjálvur av, hvussu tú innrættar, ella um tú byggir út við altan, kvisti ella øðrum.

Kundi tú hugsað tær at fingið tak yvir høvdið, so ring til Føroya Sparikassa og tosa við Jákup Jacobsen (lok. 524). Frá honum fært tú alt tær nýtist at vita.

FØROYA SPARIKASSI